# Saman inn í framtíðina

JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri, valevni á Lista E



Valið týsdagin er avgerandi fyri, hvussu menningin verður í Tórshavnar kommunu næstu fýra árini.

Listi E hevur bjóðað seg fram við eini fjølbroyttari valskrá, sum leggur dent á trivnaðin hjá heildini, virðing fyri borgarunum á bygd og í bý og ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk.

Vít vísa til avrikini hjá sitandi býráðssamgongu og tora at siga, at ein sterkur Listi E á odda í Tórshavnar Býráð borgar fyri, at menningin heldur fram undir tryggari leiðslu.

Vit vilja tann rúmliga høvuðsstaðin, sum fram um aðrar kommunur tekur upp á seg uppgávur, sum eisini gagna landinum øllum.

Vit vilja tann framsókna høvuðsstaðin, sum tekur upp á seg at hýsa miðnámsskúlum og altjóða universiteti til frama fyri menning í Føroyum.

Vit vilja tann mentaða høvuðsstaðin, sum hevur framkomin og fjølbroytt tilboð innan mentan, skúla, frítíðar- og ítróttalív.

Vit vilja, at gransking verður ein natúrligur táttur í okkara kommunu til frama fyri okkara framtíð.

Vit vilja tann vinnuliga høvuðsstaðin, sum eggjar til nýtt virksemi og nýggjar vinnur, tí gott vinnulív og góður trivnaður eru tvær síður av somu søk.

Vit vilja tann reina høvuðsstaðin, sum slóðar fyri í umhvørvis- og orkumálum, ið eru mest týðandi mál í heiminum í dag.

Vit vilja tann rekreativa høvuðsstaðin, har fólk við gleði kunna leita sær út í nattúruna.

Vit vilja menna Miðbýin, so hann aftur fær ein lívligan leiklut í býarmyndini.

Vit vilja seta Musikkskúlan á dagsskrá beinanvegin til tess at loysa málið í komandi valskeiði.

Vit vilja útvega grundstykkir allastaðni í kommununi, so fólk kunna seta búgv, har tey helst vilja.

Vit vilja hava skil á eldraøkið, so tey gomlu og óhjálpnu ikki longur reka fyri vág og vind.

Vit vilja menna fólkaræðið í kommununi, so politikarar koma nærri at dagliga virkseminum.
Vit vilja opinleika og gjøgnumskygni í kommunalu fyrisitingini og politiska arbeiðnum í býráðnum.

Fram um alt vilja vit stýra Tórshavnar kommunu við fíggjarligum skili og hava atlit til, at hjólini mala.

Vilt tú saman við okkum hava ávirkan á framtíðina, so atkvøður tú fyri Lista E týsdagin.

X við E.

# Orð og gerðir eiga at ganga hond í hond

MARJUN OLSEN



Hetta er tíverri ikki tað vit hava sæð seinastu 4 árini, tá talan er um samstarv og samanlegging til eina kommunu.Hetta er til stóran skaða fyri trúvirði um viljan hjá kommunum til samstarv og samanlegging

Tað er ein sannroynd, at tað eru tær báðar størstu kommunurnar, sum fyri ein stóran part seta dagsskránna. Hesar hava eftur mínum tykki ikki duga nóg væl at tosa saman. Tað kann byrja godt, tá ein tanki um samstarv uppstendur, men tá samráðingarnar fara fram, er trupuleikin frá báðum síðum hesin, ogur eru bert við um hesi ófrávíkiligu krøv vera gingin á møti, vera tey ikki tað eru ogur ikki við.

Tá man uppá henda mátan beinanvegin setur mørk fyri hvat kann toast um og hvat ikki kan, spennur ein bein fyri seg sjálvan og fremur onki samstarv.

Trupuleikin í barnaverndarsamstarvinum átti at veri loyst uttan slit, men aftur her, ófrávíkilig krøv, ístaðin fyri góðan vilja at loysa teir trupuleikar sum vóru, valdi man tann harða mátan, onki diplomati.

Tað er sera vanligt at byrjunartrupuleikar eru tá okkurt nýtt byrjar, allir partar skulu venja seg við nýggju mannagongdirnar og hava viljan til at fáa tingini at virka.

Eg trúgvi tó enn uppá eina kommunu, sum rætti vegurin, at ganga fyri Suðuroynna og hetta skal størur dentur leggjast á, komandi árini. Vóni tí at komandi bý og bygdaráð, fara undir tað tilgongd um samanlegging, sum granskingardepulin leggur upp til.

Fái eg møguleikin skal mín partur ikki liggja eftur.

# Góðu veljarar!

EDITH VANG

Tað hevur víst seg at vera eitt sera gott tiltak at fáa bussleiðina gjørda ókeypis. Nógv fleiri nýta møguleikan at koyra við bussinum, hetta er kanska serliga børn og ung, sum nú fáa høvi til at koma til og frá skúla og frítíðarítrivi ókeypis. Hesar pengar hevur fráfarandi Býráð givið væl út. Tí í seinna enda sparir hetta nógvar pengar - færri túrar við privat bilum og harvið nógv minni dálking bæði við CO2 útláti og við sliti á vegir.

Tað, sum eg kundi hugsa mær eitt sindur betri, sum valevni fyri Tjóveldi búsitandi í Kaldbak, var at ruturnar til Kaldbaks/Kollafjørð vóru nakrar fleiri og lagdar soleiðis at børn og ung úr Kaldbak eisini fingu meira nýttu av hesum góða tilboðið.

Sum er, koyra ruturnar ov sjálvdan morgun og kvøld, til at ein fær brúkt bussar bæði til og frá Havn til at gera ørindir ,serliga hjá eldri fólki uttan bil, og til tiltøk á kvøldi. Leygardag og sunnudag eru eisini ov fáar rutur til Kaldbaks og Kollafjørð. Hvat við einum bussi leygar- og sunnukvøld aftaná tiltøk í høvuðsstaðnum?

Set kross við E og Edith

**Við Tjóðveldis kvøðu
Edith**

# Eldrapolitikkur í Tórshavnar kommunu

RANNVÁ RAGNARSDÓTTIR
valevni hjá Tjóðveldi til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu

Ein tænasta, ið kann blíva betri í Tórshavnar kommunu, er tænastan til borgarar, ið ynskja at flyta úr sínum egnum húsum, tí hesi t.d eru vorðin ov stór, so hvørt sum børnini eru vorðin vaksin. Væntandi hava hesir borgarar mong ár eftir av lívinum.

Sum støðan er nú, eru ikki nógv tilboð frá kommununi til hesar borgarar. Eldraøkið er ikki enn lagt út til kommunurnar at umsita. Tjóðveldi vil arbeiða hart fyri, at hetta málsøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita, soleiðis at henda tænasta kann betrast. Útlit eru nevnuliga ikki fyri, at tænastan batnar nakað so leingi bæði kommuna og landið hava ábyrgdina av økinum.

Tænastan kann gerast betri við at byggja góðar íbúðir/smærri hús, soleiðis at møguleiki verður fyri at selja gomlu, stóru húsini og flyta í eina eldraíbúð og harvið bæði hava minni at halda, og sum kosta minni í hita og el. Samstundis kunnu tey føla seg tryggari, tí grannin er ikki so langt frá íbúðini.

Tað góða við hesari loysnini er, at samstundis verða hús leys, ið eru nóg stór at hýsa barnafamiljum.

Útboðið av ellisheimum og eldrasambýlum í kommununi er alt ov lítið. Av hesi orsøk eru bíðilistarnir til eitt nú pláss á ellisheimi ella eldrasambýlið alt ov langir. Um tørvur er á ein røktarheimsplássið, og onki pláss er tøkt, kann hetta gerast ein stórur trupulleiki hjá teimum avvarðandi, og hetta kunnu vit sum kommuna ikki liva við. Tey eldru, ið eru vorðin so veik, at tey ikki klára seg sjálv, eiga at fáa eitt tilboð, ið hóskar til teirra tørv, soleiðis at støða teirra verður virðilig.

Tjóðveldi ásannar, at eldraøkið kann ikki longur rekast sum tongul í brimi millum land og kommunur. Tað forðar fyri nøktandi loysnum.

Tí strongir Tjóðveldi á at fáa eldraøkið lagt út til kommunurnar.

# Bátaeigarar ljós fyri framman

HØGNI MIKKELSEN
býráðslimur, valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar Býráð



Tað er synd at siga, at bátaeigarar í Tórshavnar Kommunu hava havt nakran góðan í býráðnum hetta valskeiðið. Tað er onki nýtt bátapláss komið í hesum vælskeiðinum, men eitt kann sigast - nógv er tosað -, og hevði bara helvtin av tí verði gjørt, so var ongin bíðilisti til bátapláss.

Í 2004 bleiv undirritaði ringdur upp av fólki, sum hevði gjørt eitt uppskot til smábátahavn í Álakeri. Tað uppskotið varð latið inn til kommununa, men onki hendi. Ikki fyrrenn undirritaði kravdi uppskotið á fund í havnarnevndini bleiv tað tikið í álvara.

Kanningar vóru gjørdar av Álakeri, og úrslitið varð, at pirurin á havnini á Argjum skuldi longjast, áðrenn farast kundi at gera Álaker til bátahavn. Tað sum fyrst skal gerast, er at fáa arbeiðið á Argjum gjørt, og síðani at byrja arbeiði í Álakeri, men skal uppskotið ikki detta á gólvið, er at fáa fólk í býráðið, sum tosar um tykkara áhugamál. Tað vil eg gera, um eg verði valdur.